# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nú er hin lagaliga løtan

Tingformaðurin hevur stevnt løgtinginum til fundar týsdagin 19. januar kl. 11. Merkisvert er tað, at hesin fyrsti tingfundurin í 2010 verður júst, tá ið hetta valskeiðið verður hálvrunnið. Løgtingsval var leygardagin 19. januar í 2008, og løgtingsval verður aftur í seinasta lagið hósdagin 19. januar í 2012.

Tá ið valskeiðið er hálvrunnið, eigur at verða roknað við, at politiska arbeiðið í hesum valskeiðnum er í hæddini. Royndirnar frá sluttspurtinum seinasta valskeiði eiga at hava lært politikararnar, at tað er ikki gott hugskot at bíða við stórum reformum, inntil tað bara eru fáar vikur eftir av valskeiðnum. Á heysti í 2007 var bruni í, og endin var, at tað var útskrivað, meðan ein rúgva av uppskotum framvegis lógu í tinginum. Hesum vilja politikararnir sleppa undan hesa ferð, og samfelagið hevur ikki ráð til ein sovorðnan kiksara eina ferð aftrat.

Royndirnar nógvu tær seinastu ferðirnar hava víst, at síðsta árið undan valinum, ansa politikararnir serliga nógv eftir hvørjum øðrum. Royndirnar vísa eisini, at frá ólavsøku og til ársskiftið snýr politiska arbeiðið seg fyrst og fremst um fiskidagarnar og síðani fíggjarlógina. Tí er tað nú, at lagaliga løtan at fremja stóru og grundleggjandi broytingarnar, sum tað sigst vera breið semja um, at tað er neyðugt at fremja.

Í fleiri valskeið hevur verið tosað um nýggjan kommunalan bygnað og um at skipa fiskivinnuna av nýggjum. CHE samgongan legði djúptøkið uppskot um broytingar í fiskivinnulóggávuni fram á ólavsøku í 2008. Uppskotið var við til at gera enda á samgonguni. Gongdin seinasta árið hevur víst, at tað framvegis er neyðugt við stórum broytingum, og um landsstýri, samgonga og løgting megna at taka seg saman, so fer tað ivaleyst at vísa seg, at fiskivinnureformurin – hóast talan er um aðra samgongu – ikki fer at vera heilt ólíkur tí, sum var við til at ryggbróta CHE samgonguna.

At inntøkurnar hjá tí almenna so heilt hava svikið, hevur av álvara kynt undir spurningin um at dagføra almenna geiran, sum tað nú eitur. Umframt inntøkusíðuna og harvið skattalóggávuna, so hevur hetta ikki minst við útreiðslur til vælferðartænasturnar at gera. Hvussu skulu heilsuøkið, almennaøkið, útbúgvingarøkið og samferðsluøkið skipast. Hetta hongur alt saman. Eftir nógv prát og ikki so nógv arbeiði í mong ár tykist pensiónsspurningurin nú at vera komin rættuliga nær einari breiðari semju. Fleiri av hinum spurningunum hanga framvegis í leysum lofti.

Umframt fíggjarliga tungu spurningarnar og eisini marknaðarspurningin, sum enn eina ferð tykist vera uppsteðgaður, so hevur tingið givið sær sjálvum eina aðra uppgávu, sum skal loysast heilt skjótt. Tað er spurningurin, um Føroyar á næsta vali skulu vera skipaðar í eitt ella fleiri valdømi. Tað er nú, at tað er tann lagaliga løtan at arbeiða við og loysa hesar spurningarnar. Tað, sum ikki verður nortið í vár, verður hesu megin løgtingsvalið ikki annað enn valflesk!

**Sosialurin**

## Sjálvhjálparbólkur fyri børn og ung byrjar aftur

**Higartil hava millum 200-300 børn og ung ymsa staðni úr Føroyum verið við í sjálvhjálparbólkum hjá Beranum. Nýggir bólka byrja nú aftur**

TÍÐINDASKRIV
*Berin*

Berin er ein sjálvhjálparbólkur fyri børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin.

Nýggir bólkar byrja aftur mikudagin 3. februar.

Nýggj bólkaskeið byrja hálva hvørt ár, um ársskiftið og eftir summarfrítíðina. Hesaferð verður ein bólkur fyri yngri tannáringar (umleið 12-14 ár) og eldri tannáringar.

Endamálið við Beranum er at savna børn og ung, ið hava mist, og at geva teimum rúm til at møta øðrum børnum/ungum í somu støðu. Harumframt at stuðla teimum í at seta orð á kenslur og tankar, ið eru knýtt at sorgini. Á henda hátt hava tey sum frálíður størri møguleika fyri aftur at fáa eitt gott og innihaldsríkt lív, har tey kunnu mennast og liva við missinum.

Børnini og tey ungu møtast annan hvønn mikudag kl. 16-18 í hølunum hjá heilsufrøðinginum í Eysturskúlanum.

Higartil hava millum 200-300 børn og ung ymsa staðni úr Føroyum verið við.

Afturmeldingarnar frá teimum, ið hava verið knýtt at Beranum, hava verið sera positivar. Tað, sum børnini/tey ungu, fyrst og fremst leggja dent á, er, at tey kenna seg ógvuliga einsamallan við sorgini, og at tað gevur teimum nógv at møta øðrum javnaldrum í líknandi støðu. Í einum slíkum felagsskapi uppliva tey, at tað eru onnur í veruliga skilja tey. Hetta er við til at gera tey meira opin fyri at seta orð á truplar tankar og kenslur, sum tey annars byrgja innan í sær sjálvum, og brynjar tey til at koma víðari.

Áhugað kunnu fáa meira at vita við at ringja til Jóngerð Poulsen á telefon 562352, Annu Dalsgaard á telefon 229552 ella Oddvør Poulsen á telefon 504145 og lesa meira á heimasíðuna hjá Beranum www.berin.fo

## Sjúkrakassarnir

FRITS JOHANNESEN
limur í Fuglafjarðar sjúkrakassa



Mangt er løgið, ja, mangt og mikið er løgið. Vit høvdu eina góða skipan við sjúkrakassunum kring landið. Ein skipan, sum hevði sítt festi í bygdasálum, bygdaløgum, býarstøðum og so samhaldsfast. Vaks fram í fólksligum anda við vanligum bygdafólkum og býarbørnum. Varð borin uppi við góðari mannahugsan, tá ið t. d. um rakstur av hesum kassum, tað galt. Nei, hann komi til mín, hetta, sum hevur virkað stak væl í ár so mong, skal takast av. Eingin tekur eina góða ær av, ella ger ein vánaligan brund upp. Nú skal orðið samhaldsfast brúkast bæði til knettir og frikadellir, til kassar, heilsutrygd og verða til eitt skálkaskjól, nú okkara kæru býar – og bygdasligu sjúkrakassar skulu í søguna.

Hví taka tit nakað av sum "fungerar"? Vit vita, hvat vit hava og vita ikki, hvat vit fáa. Orðið bygdamenning hevur verið á hvønn mans vørrum í fleiri ár. Eg hugsaði mítt, tá ið rópt verður upp um tað, so gongur tað tann skeiva vegin. Postboðini vóru avsøgd, sjúkrakassarnir eru avsagdir og at vera a útoyggj í dag, tað er eitt tógvið stríð. Sjúkrakassin lívgaði um tína fatan, at her var nakað, sum hevði sítt festi í býar- og bygdasligum anda. Postboðini vóru eisini ein partur av tínum medviti. Nú kemur posturin á stummari nátt, og tú veitst ikki, hvør kemur við honum. Jú, tað skal vera samhaldsfast á einum fremmandum støði, so streymlinja uttan sál og anda.

Í morgun bórust tíðindi at heilsutrygd skal leiga seg inn í Klaksvík, og fólk bjóðau seg fram í Klaksvík at taka ímóti hesum samhaldsfasta sjúkrakassa, sum hevur mist sína bygdasligu sál. Samhaldsfastur merkir - sum hevur samábyrgd og samstøðu við onnur.(Móðirmálsorðabókin)

Hevði Aksel Johannesen, landstýrismaður, havt samábyrgd, so legði hann ikki heilsutrygd í Klaksvík, men í Fuglafirði. Her eigur sjúkrakassin eini góð hús til endamálið. **Gevið gatur: Sjúkrakassin eigur eini stór og góð hús í Fuglafirði.**

»Aksel! Her vóru fleiri túsundir at spara í krónum og oyrum, men her tykist tað mær, at tú sparir dálan og letur skillingin ganga!« Fuglafjarðar sóknarsjúkrakassi er bíligasti rikni sjúkrakassi í landinum. Dinna Poulsen, sum hevur røkt henda kassa, veit um nógv at siga. Her hevur tú stjóran longu, og húsini eru klár at flyta inn í. Hevur Aksel samstøðu við tað bygdasliga, ella, at dríva heilsutrygd so bíliga sum gjørligt, so leggur hann ikki Heilsutrygd í Klaksvík, men í Fuglafirði.

Annars takki eg Dinnu, Petur Martin Petersen og Ditlev Róin (grannskoðarar), nevndini og limunum fyri øll hesi góðu ár, vit vóru í somu song.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.